# okkara



*Talan er um show, tá Shu-bi-dua fara á pallan. Eitt show, sum higartil hevur vart í 33 ár. Og enn tykjast teir ikki hava nakran hug at steðga*

*Mynd: Scanpix/Bo Amstrup*

**Gleða seg til Føroyar**

Hóast teir eisini eru átøkir fólkaogn í Føroyum, so er hetta bara næsta ferðin, at Shu-bi-dua koma á pall í Føroyum. Men Bundesen sjálvur leggur dent á, at hetta avgjørt ikki er orsakað av vantandi hugi til frá teirra síðu. Heldur tvørtur ímóti.

– Vit spæla fyri tað allarmesta í Danmark, so tað er deiligt at sleppa at royna okkurt annað. Tí gleða vit gleða okkum sera nógv til at koma til Føroya at spæla. Tað var fantastiskt at spæla í Føroyum seinast, so vit eru sera spentir til at koma aftur í ár.

– Tað er ikki so ofta, at vit ferðast uttan fyri Danmark við okkara tónleiki, so vit royna altíð at njóta tað, tá vit fara avstað. Vit hava fleiri ferðir spælt fyri dønum uttanlands, millum annað í Australia, USA, Italia og aðrastaðni, og tað hava altíð verið góðar ferðir.

– Seinast vit vóru í Føroyum, spældu vit í eini ítróttarhøll, men hesaferð spæla vit uttandura, og sum eg havi skilt, so verða tað fleiri ferðir so nógv fólk og lurta eftir okkum hesaferð.

- Vit fara at spæla somu sangir, sum vit vanliga spæla í Danmark, tá vit koma til Føroya. Seinast upplivdu vit, at føroyingar kendu allar okkara sangir. Tá vistu vit faktiskt ikki av, at føroyingar kendu okkara tónleik so væl, men tað gjørdu teir. Tað var sera hugaligt at uppliva, og vit ætla at geva føroyingum eina ordans konsert aftur hesaferð.

## Heiðraðu ævintýraskaldinum

Seinasta útgávan, sum Shubidua stóð fyri, var ein fløga, sum byggir á ævintýrini hjá H.C. Andersen. Hetta var partur av stóra hátíðarhaldinum kring stóra skaldið, sum í fjør hevði fylt 200, var hann framvegis á lívi.

Serstakliga regnaðu rósurnar frá ummælarunum, tá tosið fall á gentuna við svávulpinnunum, sum er ein av sangunum á fløguni.

At bólkurin soleiðis var við til at mynda hátíðarhaldið av tjóðarskaldinum sigur helst nakað um, at teir eisini eru tjóðarogn, men fyri tað hava teir so ongan hug at steðga.

– Vit hava skrivað nakrar sangir til eina nýggja útgávu, so tað ber til at siga, at okkara 19. fløga er á veg. Vit eru tó komnir í ein aldur, har vit ikki leggja okkum sjálvar undir tíðartrýst, so fløgan kemur, tá ið tónleikurin er klárur, sigur Michel Bundesen.

Nær nýggja fløgan kemur á marknaðin, veit hann ikki, men tað verður helst eina ferð í 2007, metir hann.

**-mørk**

# Søgan í stuttum

Bólkurin varð stovnaður í 1973, tá Michael Bundesen og Michael Hardingar til stuttleikar spældu eina danska parodi av Jailhouse Rock. Lagið fekk heitið »Fed Rock«. Dagin eftir at lagið var at hoyra á P3, har teir báðir arbeiddu, fingu teir tilboð frá PolyGram, sum vildi geva lagið út á eini singlu.

Hetta var byrjanin til eina tí størstu donsku succés-søguna innan danskan tónleik, tó at tey mongu fyrstu løgini vóru fyrsta útgávan mest sum bara innihelt danskar umsetingar og –skrivingar av enskum løgum. Soleiðis komu Stærk Tobak (Twist & Shout) og Rap Jul (White Christmas) eisini frá teirra hondum.

Næsta fløgan var ikki stórt øðrvísi, men tá alt fleiri bólkar fóru undir útgávur úr somu nichu – umsetingunum – skifti bólkurin hest. Fyrsta hittið, sum bólkurin sjálvur skapti við egnum midlum, var Hvalborg, sum var á Shu-bi-dua 3. Eitt lag, sum bar dám av countrytónleiki í eagles stíli. Ein stílur, sum eisini eyðkendi løg sum Vuffeli-Vov og Midsommersangen.

Bólkurin var longu stórur, men við fjórðu LP-útgávuni sprongdu teir øll mørk. Sum fyrsta danska útgávan nakran tíð rundaði sølutalið tey 200.000 eintøkini, og so byrjaði søguskrivingin av álvara. Í dag hevur Shu-bi-dua selt yvir 450.000 eintøk, og enn verða eintøk dag og dagliga langað um handilsdiskarnar.

Og síðani eru hittini bara rullaði eftir samlibandinum. Danmark, Midsommervisen, Minus til plus, Rom & Cola, Den Røde Tråd, Knuden, Sexchikane, We Wanna Be Free, Costa Kalundborg og mong, mong onnur hava ár eftir ár rúgvað upp á donsku radiohitlistunum. Íalt hevur talan verið um 18 serstakar útgávur, sum í besaat biografi-stíli eru navngivnar við nummarinum á útgávuni (undantikið fimta útgávan, sum eitur 78'eren). Hartil er talan sjálvandi um uppsamlingar av ymsum lag, eins og teir í 2004 góvu út fløgu við Radio-orkestrinum.

Fólkaogn eru teir av álvara blivnir, og nú – 33 ár seinni – er bólkurin framvegis eins aktivur, sum hann altíð hevur verið. Og hóast tað nú bara er Bundesen, sum er eftir av originalu manningini, so er tónleikurin og stílurin framvegis tann sami. Reint Shu-bib-dua. Reint danskt. Reint fólksligt.

**-mørk**

## Diskografi

| | | | |
|---|---|---|---|
| Shu-bi-dua 1 (á fløgu í '90) | 1974 | Stærk Tobak! (uppsamling) | 1991 |
| Shu-bi-dua 2 (á fløgu í '90) | 1975 | Shu-bi-dua 13 | 1992 |
| Shu-bi-dua 3 (á fløgu í '90) | 1976 | Live og glade dage (Live & unplugged) | 1994 |
| Shu-bi-dua 4 (á fløgu í '90) | 1977 | Shu-bi-dua 14 | 1993 |
| 78'eren (á fløgu í '90) | 1978 | Shu-bi-dua 15 | 1995 |
| Leif i Parken (Live - á fløgu í '90) | 1978 | Shu-bi-dua 16 | 1997 |
| Shu-bi-dua 6 (á fløgu í '90) | 1979 | 40 bedste (uppsamling) | 1997 |
| Shu-bi-dua 7 (á fløgu í '90) | 1980 | Shu-bi-læum 73-98 (uppsamling) | 1998 |
| Shu-bi-dua 8 (á fløgu í '90) | 1982 | Shu-bi-dua 17 | 2000 |
| Shu-bi-dua 9 (á fløgu í '90) | 1982 | Rap jul og godt nytår (jóla- og nýggjárssangir) | 2001 |
| Shu-bi-dua 10 (á fløgu í '90) | 1983 | Shu-bi-dua 200 (box við 200 sangum) | 2003 |
| Shu-bi-dua 11 (á fløgu í '90) | 1985 | Symo-ni-dua (við RadioUnderholdningsOrkestret) | 2004 |
| Da mor var dreng (uppsamling - á fløgu í '90) | 1985 | Shu-bi-dua 18 | 2005 |
| Shu-bi-dua 12 (á fløgu í '90) | 1987 | | |